# Loksins eydnaðist tað Kyndli

*Fyri fyrstu ferð í søgu felagsins, eydnaðist tað kyndilskvinnunum at vinna finaludystin í steypakappingini. Hetta hendi eftir eina sera spennandi finalu, har allir leikarar á báðum liðum góvu alt tað, tær áttu. Tó var ein leikari, sum skaraði fram um allar aðrar, og varð tað sum ikki eina ferð Marita Hermansen í kyndilsmálinum*



*Christina Holm og liðfelagar hennara máttu taka til takkar við einum teprum tapi, men vóru tær eitt lítið sindur hepnari, kundi tað eins væl verið tær, sum stóðu við steypinum, tá dysturin var lokin*

***Mynd: Jonhard Hammer***

Jákup Mørk

Kyndil-VB 22-21 (12-11)

Tað var um at gerast rættuliga trongt, tá steypafinalan hjá kvinnunum varð bríkslað í gongd av dómaraparinum. Nógv viðhaldsfólk hjá báðum feløgum høvdu gjørt seg til, og rópini dundu oman til leikararnar. Ja, somikið har varð rópa, at leikararnir valla fingu tosað millum sín.

### Komu væl aftur

Nú veit eg ikki, um tað var nógvi gangurin, sum órógvaði VB liðið, men í byrjanini av dystinum hekk snøgt sagt einki saman hjá teimum.

Spælið koyrdi seint runt, og gjørdi hetta verjuuppgávuna hjá kyndilsliðnum alt ov lætta. Snøgt ráddi bert um hjá Ann at fylgja við, hvønn veg Regina mundi fara, og so at blokka, tá skotini fullu.

Hjá Kyndli lá munandi betri fyri, álopini gingu skjótt og væl, og tá skotini eisini sótu har, sum tey skuldu, var lítið at siga til, at Kyndils fekk eina trygga leiðslu beinan vegin.

Eftir eitt time-out, eydnaðist tað tó hjá VB at fáa skil á spælið, og spakuliga fingu tær minkað um munin upp til kyndilsliðið. Regina hevði skift pláss, soleiðis at hon nú var á veinginum, har eingin Ann var at taka hana, og í verjuni var skift til 5-1, og tóktist hetta at rigga nógv betri.

Tá farið var til hálvleiks, var munurin sostatt minkaður niður í eitt mál, og flestu áskoðararnir mundu nú vera sannførdir um, at talan fór at gerast um eina sera spennandi finalu.

### Lotte mansvard

Seinna hálvleik byrjaði Marita við at vísa, at hon kanska fór at hava ein av sínum góðu døgum. Í fyrra hálvleiki hevði hon tikið eitt brotskast frá Reginu, og beint sum seinni hálvleikur var byrjaður, var hon aftur í fokus, tá hon bjargaði einum brotskasti frá Sólrun Krosslá.

So at siga allan seinna hálvleik stríddust liðini bæði ein sera javnan dyst. Fleiri ferðir kom VB upp á liðina á kyndilsliðnum, men fram um sluppu tær bara ikki.

Í royndunum at steðga kyndilsliðnum, varð gjørt av at mansverja Lotte Sørensen. Hetta tók sjálvandi ein part av kyndilsálopinum, men Beinta, sum var komin heim til finaludystin, og Ann gjørdu sítt til, at missurin ikki gjørdist so stórur kortini.

Onkuntíð slapp Lotte kortini fram at, og tá skotini sita somikið vær, sum talan var um leygardagin, er lítið hjá málverjunum at gera. VB royndi seg við ikki færri enn trimum av slagnum, men líkamikið hvat og hvussu, so megnaði Lotte kortini at finna vegin til meskarnar.

### Marita bjargaði Kyndli

Móti endanum av dystinum var tað tó um reppið, at VB slapp at leggja seg fram um kyndilsliðið. Kyndilsliðið var júst tá skert, við tað at Ann hevði fingið tveir fingrar frá dómaranum.

Við støðuni 20-20 eydnaðist tað VB at bróta eitt kyndilsálop, og Sólrun Krosslá fekk fría kós móti málinum. Við eini meistaraligari bjarging fekk Marita tó vart fyri, og í næsta álopinum noyddist Arnleyð Krosslá út, tá hon var eitt sindur harðlig við Lotte.

Kyndil slapp nú aftur fram um, men í næsta álopinum javnaði Regina til 21-21. Kyndil legði seg enn eina ferð fram um, tá Ann eftir eitt sera vakurt álop slapp leys mitt fyri og kundi skjóta seinasta málið í dystinum, men dysturin var tó als ikki liðugur enn.

Sólrún slapp enn einaferð fram við kyndilsverjuni, men aftur hesu ferð hevði Marita eina hond við í spælinum, og so kundi Kyndil fara í álop, tá tað bert restaðu umleið 30 sekund.

Onkursvegna mistu tær bóltin til vágsgenturnar, og seinasta álopsroyndin endaði við, at Regina slapp leys á vinstra vengi, men ennn eina ferð var Marita fyri, og so var dysturin lokin.

### Góð reklama

Tá seinasta bríkslið hevði ljóðað, kundu kyndilskvinnurnar fegnast um, at tað fyri fyrstu ferð í søgu felagsins hevði eydnast kvinnunum at at sigra í finaludystinum í steypakappingini.

Stoltar kundu tær fara fram til pallin eftir steypinum, og í bakgrundini sóust vónbrotnu vágsgenturnar. Tær høvdu rætt og slætt givið alt tað tær kundu, men tá tað kom til stykkis, var hetta ikki nóg mikið.

VB liðið hevði tó onga orsøk til at skammast, tí sum kunnugt er fortreytin fyri einum góðum dysti, at talan er um tvey góð lið, og einki er at ivast í, at talan var um ein sera góðan hondbóltsdyst leygardagin.

Kanska er tað skeivt, at taka ein einstakan leikara burtur úr, men eftir mínum tykki var tað Marita Hermansen, sum átti størsta heiðurin av kyndilssigrinum. Tríggjar tær seinastu bjargingarnar vóru avgerandi fyri úrslitið, og júst hetta, at kunna tá man skal, er tað, sum eyðkennir ein góðan málverja.

Tó slepst ikki undan, at talan eisini var um eitt sera gott liðavrik hjá báðum pørtum, og hóast nógv stóð á leikarunum, so eiga tær allar rós uppiborið fyri, at talan ongantíð gjørdist um ljótt ella ófantaligt spæl.

Tilsamans vóru ikki fleiri enn 4 útvísingar, og má hetta sigast at vera sera lítið í einum somikið intensum dysti, sum talan var um.

Alt í alt ein sera góð reklama fyri hondbóltin, sum enn tá, varð varpað út til alt Føroya fólk.



*Beinta Sørensen var komin heim til dystin, og tað hevði alstóran týdning, at hon tók ábyrgdina á sínar herðar, tá VB fór at mansverja Lotte Sørensen*

***Mynd: Jonhard Hammer***

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Lotte Sørensen 8 (2), Ann Hansen 4 (1), Beinta Sørensen 3, Palma Petersen 2, Rakul Joensen 2, Jensia Petersen 2, Frida Johannesen 1
VB: Gurið Mortensen 6, Regina Rádó 5 (1), Christina Holm 4, Sólrun Krosslá 3, Arnleyð Krosslá 2, Rannvá Augustinussen 1
**Brotskøst:**
Kyndil 5, VB 3
**Útvísingar:**
Kyndil 3, VB 1
**Dómarar úr Neistanum:**
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen



# Kyndil fekk sær ein dupultan

*Fyrstu 58 minuttirnar av finaludystinum hjá monnunum, eydnaðist tað ikki Kyndli at ota seg fram um grannarnar úr Neistanum. Seinastu tveir minuttirnar fingu teir tó fatur í langa endanum, og so var kyndilsveitslan fullkomin, tá bæði kvinnur og menn høvdu tryggjað sær heitið sum steypavinnarar 2000*

Jákup Mørk

Kyndil-Neistin 22-20 (10-14)

So skjótt sum steyp og heiðursmerki vórðu handað kvinnuliðunum, sum framman undan høvdu gjørt finaludystin av sær, vóru bestu mansliðini hjá Kyndli og Neistanum at síggja á vøllinum, har vøddarnir skuldu hitast og mýkjast áðrenn stóra dystin.

Sum nevnt í leygardagsblaðnum, so vóu krøvini hjá kyndilsliðnum sera greið undan dystinum. Varð dysturin ikki vunnin, kundu teir helst gloyma alt um at vinna nakað sum helst í ár, og fyri sigursvanda havnarfelagið, hevði hetta helst verið ein sera herskin biti.

Krøvini til neistaliðið vóru kanska ikki heilt so ultimativ, men hinvegin vildu teir sjálvsagt ógvuliga fegnir fingið fatur á steypinum. At tað vóru grannarnir, sum stóðu himumegin miðlinjuna, órógvaði kanska als ikki, tí í trimum innanhýsis uppgerðum higartil í ár hevði Neistin hvørja ferð verið við yvirlutan.

### Kanónirnar dundu

At byrja við var eisini líkt til, at neistaliðið so sanniliga eisini ætlaði sær at vinna hesa uppgerðina móti grannunum.

Álopsspælið gekk sera væl fyrstu tíðina, og umframt at Áki og Heini høvdu onkur av sínum vælkendu høggum, sluppu aðrir leikarar sær eisini fram at.

Í verjuapartinum stóð liðið seg eisini sera væl, og gjørdust kyndilsmenninir ov naskir, tók Petur Magnusson sær av tí mesta.

Einastu kyndilsleikararnir, sum veruliga megnaðu at hótta neistamálið, vóru tveir av ungu leikarunum á liðnum, Janus Einar Sørensen og Bjarni Wardum. Av teimum tíggju málunum, sum Kyndil fekk fyrra hálvleik, áttu teir heili sjey, og høvdu teir sín part av æruni fyri, at munurin í hálvleikinum ikki var størri enn tey fýra málini.

Serliga var tað merkisvert, at Janus Einar skuldi gera somikið nógv um seg. Ikki tí, hann er góður spælari, sum uttan iva hevur evnini til at gerast fremsti strikuspælarin í landinum, men tað tóktist ørkymla neistaverjuna nakað, at Kyndil gjørdi somikið nógva nýtslu av strikuspælinum, ístaðin fyri at nýta yvirgongdirnar á bakkinum.

Sum, hálvleikurin leið, byrjaði kyndilsverjan at fáa betri fatur á Heina, soleðis at verjan rullaði við, tá hann skuldi spælast upp til skot. Verri var statt hinumegin, og satt at siga gjørdi Áki júst sum honum lysti. Skotini brakaðu avstað, og Lars kundi ikki gera tað stóra fyri at verja meskararnar aftan fyri seg.

Ivaleyst hildu neistaviðhaldsfólkini, at sigurin var so at siga vísur, og tá Heini við einum skotið frá 20 metra fjarstøðu langaði bóltin í málið til hálvleiksstøðuna 14-10 mundi fagnaðurin ongan enda tikið.



*Í fyrra hálvleiki høvdu kyndilsmenn alstórar trupulleikar av stórskjúttunum báðum hjá Neistanum. Í seinna hálvleiki vórðu Áki og Heini tó mansvardir, og tá lá betur fyri hjá Kyndli*

***Mynd: Jonhard Hammer***

### Mansverjan riggaði

Kyndilsleikararnir tóktust eisini at hanga nakað við høvdinum, tá komið var út til seinna hálvleik. Tað tóktist nærum soleiðis, at leikararnir høvdu mist alla vón, men tað skuldi tó vísa seg, at soleiðis var nú ikki.

Seinni hálvleikur byrjaði tó við sama skili, men tá okkurt um triðingurin av teimum 30 minuttunum vóru leiktir, tók kyndilsvenjarin, Sophus Dahl Christiansen, eina avgerð, sum skuldi vísa seg at hava avgerandi týdning fyri endaliga úrslitið.

Í eini seinastu roynd at tippa kanónirnar hjá Neistanum varð gjørt av at mansverja bæði Aka Olsen og Heina Joensen.

Spakuliga kom Kyndil nú nærri og nærri Neistanum, men spurningurin var, um ikki ov nógv longu var mist. Tað vísti seg tó, at alt neistaliðið fullkomuliga steðgaði upp, nú stórskjúttarnir báðir ikki vóru tøkir.

Harafturat fann Lars Winther í málinum brádliga upp á, at nú skuldi eingin bóltur afturat fram við honum. Líkamikið hvat og hvussu, so var hann fyri bóltinum, og einar tvær ferðir bjargaði hann meistaraliga, tá Finnur slapp púrasta leysur av verjuni.

Í hinum gekst ikki eins væl hjá Peturi, sum tað gjørdi í fyrra. Hetta broyttist tó, tá Páll gjørdi av at senda Boga Henriksen í málið, men hóast Bogi stóð seg væl, tað lítla korterið hann var á vøllinum, so megnaði hann ikki einsamallur at halda kyndilsmonnunum frá málskjótingini.

So hvørt sum munurin minkaði gjørdust kyndilsmenninir alsamt grammari, og tá tveir minuttir vóru eftir at leika, komu teir endiliga fram um mótstøðumenninir, tá Hannis Wardum, sum nú er komin fyri seg eftir skaða, skoraði til 21-20.

Enn vóru tó eini 30 sekund eftir at spæla, so Neistin hevði møguleikan at koma aftur í aftur.

At teir ikki fingu møguleika til tess komst av, at teir ístaðin fyri at geva sær stundir til seinasta álopið, skundaðu sær inn móti kyndilsverjuni. Úrslitið varð, at teir noyddust at royna eina upstilling til tríggja metra kast, og tá henda miseydnaðist, kundi Hannis fanga bóltin og róliga kundi hann renna oman móti Boga Henriksen og langa seinasta málið í meskarnar.

At neistaleikararnir tá høvdu mist alla vón var eyðsæð. Tað vóru nøkur sekund eftir at spæla, tá Hannis fekk fatur á bóltinum, men eingin neistamaður sást fara rennandi eftir honum, í eini seinastu desperatu royn at forða fyri tapinum.

### Vunnu á beinkinum

At tað hevði alstóran týdning fyri úrslitið, at Heini og Áki vórðu mansvardir, er helst eingin loyna, men tað er kortini undrunarvert, at neistaliðið ikki hevði nøkur móttrekk móti hesum.

Tað er ikki fyrstu ferð, og neyvan seinastu ferð, at teir báðir verða mansvardir, og tískil skuldi ein trúð, at liðið var fyrireikað upp á, at henda støðan tók seg upp.

Tað, sum hendi, var tó, at als einki hendi. Neistin fekk einans seks mál allan seinna hálvleik, harav trý brotskøst, og hetta er snøgt sagt ov vánaligt.

Eingin av hinum leikarunum gjørdi nakað sum helst um seg, og tað kann jú ikki vera ætlanin, at øll ábyrgdin skal hanga á tveimum herðum. Gaman í, Lars stóð ein ótrúliga góðan seinna hálvleik, men allíkavæl…

Enn er alt tó ikki mist hjá Neistanum, men skulu teir gera sær nakrar vónir um eitt FM-heitið, er tvingandi neyðugt, at venjarin fer at leita sær eftir ráðum móti hesum vápni.



*Saman við Bjarna Wardum, var Janus Einar við til at halda leiðsluni hjá Neistanum niðri í fyrra hálvleiki*

***Mynd: Jonhar Hammer***

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Bjarni Wardum 6 (1), Janus Einar Sørensen 6, Hannis Wardum 5 (1), Hans Áki Dahl Christiansen 3, Uni Wardum 1, Regin Petersen 1, Jacob Jónsson 1
Neistin: Áki Olsen 8 (1), Heini Joensen 6 (3), Finnur Hansson 2, Kári Mortensen 1, Jákup Sverri Kass 1, Karl Oddmar Rasmussen 1, Áki Mørk 1
**Brotskøst:**
Kyndil 3, Neistin 4
**Útvísingar:**
Kyndil 4, Neistin 1
**Dómarar úr Tjaldur:**
Dánjal Hansen og Kári Hansen